# Barnahúsið 2023



## Ársfrágreiðing

Mars 2024

Barnaverndarstova Føroya

# Innihald

1 Inngangur ........................................................ 1
2 Mál í Barnahúsinum ........................................................ 2
Ráðgeving ........................................................ 2
3 Høvuðsúrslit ........................................................ 2
4 Átrokandi dagføringar av tilboðnum hjá Barnahúsinum ........................................................ 3
5 Tal av byrjaðum og endaðum málum ........................................................ 5
6 Slag av ágangi í málum, sum eru endað ........................................................ 6
6.1 Hvat fevnir harðskapur og kynsligur ágangur um? ........................................................ 6
7 Samanbering við donsk tøl ........................................................ 7
7.1 Býtið harðskapur og kynsligur ágangur ........................................................ 7
7.2 Barnahúsmál pr. 1000 børn 0-17 ár ........................................................ 8
8 Kyns- og aldursbýti í endaðum málum ........................................................ 8
9 Fólk, ið eru undir *illgruna* í sambandi við barnahúsmál ........................................................ 9
10 Støðið undir virksemi okkara ........................................................ 10

# 1 Inngangur

Síðan 18. desember 2013 hevur verið lógarásett fyri barnaverndartænasturnar at brúka Barnahúsið sum lið í barnafakligum kanningum um mál, har illgruni ella vitan er um, at barn millum 0 og 17 ár hevur verið fyri harðskapi ella kynsligum ágangi, og har tørvur er á at taka sjúkrahúsverk og/ella løgreglu uppí. 1. januar 2014 byrjaði Barnahúsið sostatt virki sítt, sum merkir, at vit nú hava 10 ár á baki.

Barnahúsið hevur sum endamál at vera ein felags karmur fyri tvørgeiraligum samstarvi millum avvarðandi myndugleikar í málum um ágang á børn, tá tørvur er á tí. Í Barnahúsinum savnast umboð fyri kommunu, tað vil siga barnaverndartænasta umframt løgregla og sjúkrahúsverk, fyri at samskipa arbeiðið um barnið. Endamálið er, at barnið fær røttu hjálp og rættan stuðul í barnavinarligum kørmum. Ein tilgongd í Barnahúsinum verður løgd til rættis við støði í tørvinum hjá hvørjum einstøkum barni, og kann til dømis fevna um kreppuhjálp til barnið og tess umsorganarpersónar, greinandi samrøður, videoavhoyring og pædiatriska kanning. Barnaverndarstova Føroya samskipar hetta samstarv.

Barnaverndarstova Føroya skrásetir viðkomandi upplýsingar um børn, sum fara gjøgnum tilgongd í Barnahúsinum og almannakunnger ársfrágreiðing, sum hevur til endamáls at veita vitan um ágang á børn í Føroyum og skráseta virksemið hjá Barnahúsinum.

Avbjóðing okkara er, at umhvørvið í Barnahúsinum støðugt hvílir á einum tryggum grundvølli við væl skipaðum mannagongdum fyri dagliga arbeiðið við góðum sambandi millum allar avvarðandi partar, og at málini verða avgreidd so skjótt, sum til ber.

Innan barnaverndararbeiðið síggja vit javnan, at mál koma fram, har talan er um harðskap og kynsligan ágang móti børnum og ungfólki. Tá mugu barnavernd, løgregla og lækni samstarva og í felag finna gongdar leiðir. Hetta er orsøkin til, at júst hesir partar eru teir, ið vara av Barnahúsinum.

Hendan ársfrágreiðing – tann tíggjunda av sínum slagi - er skrivað fyri at geva myndugleikum og almenninginum innlit í starvsøkið. Tað er okkara vón, at ársfrágreiðingarnar gera sítt til at lýsa støðuna á ein skynsaman hátt, samstundis sum tað kemur til sjóndar, at føroyska samfelagið ikki letur harðskap og kynsligan ágang móti børnum og ungum fara aftur við borðinum.

*Oddbjørg Balle, sálarfrøðingur*
**Leiðari á Barnaverndarstovu Føroya**

## 2 Mál í Barnahúsinum

Tá ein barnaverndartænasta boðar Barnahúsinum frá um eitt barn, har illgruni er reistur um kynsligan ágang ella annan harðskap, verður eitt mál stovnað í Barnahúsinum.

Í Barnahúsinum verður tørvurin hjá barninum fyri stuðuli eftir møguligan ágang greinaður, og hendan greining er liður í barnafakligu kanningini hjá barnaverndartænastuni. Eitt barnahúsmál er endað, tá Barnahúsið hevur sent afturboðan til barnaverndartænastuna, og tann seinasta viðgerðin í Barnahúsinum er framd.

Tá eitt mál verður skrásett sum *virkið*, merkir hetta, at arbeitt verður við málinum. Tá málið verður skrásett sum *endað*, verður ein afturboðan send til avvarðandi barnaverndartænastu, og málið verður lokað í Barnahúsinum.

Eitt mál verður skrásett fyri hvørt barnið, men eitt barn kann telja upp til fleiri ferðir í hagtalsskipanini, um sama barnið aftur verður fyri ágangi, og tískil aftur gerst eitt mál í Barnahúsinum.

**Ráðgeving**

Síðani 1. mars 2022 hevur løgreglan víðkað møguleikan hjá barnaverndartænastunum á tann hátt, at tær kunnu venda sær beinleiðis til løgregluna umvegis telefon um ráðgeving í møguligum barnahúsmálum. Hetta merkir eitt tættari samstarv hjá barnaverndartænastunum við bæði løgregluna og Barnahúsið. Hendan sparring kann eisini fara fram á tann hátt, at tey involveraðu eru ónevnd. Tískil verður ráðgevingin/sparringin ikki longur skrásett sum hagtøl. Kortini er hetta ein munandi og áhaldandi partur av virkseminum hjá Barnahúsinum.

## 3 Høvuðsúrslit

Í 2023 vórðu 53 nýggj barnahúsmál stovnað. Hetta eru fleiri enn dupult som mong í mun til 2022 og nógv tað største talið í 10 ára søguni hjá Barnahúsinum. Miðaltalið er 32 mál um árið, og talið á málum hevur annars sveiggjað úr 20 upp í 39 mál. Út frá tølunum á málum ber ikki til at greiða frá, hví tølini eru, sum tey eru. Orsakirnar kunnu vera fleiri. Ein orsøk kann vera, at tað í 2023 vóru fleiri mál, har illtonktu gingu aftur í fleiri málum.

Í 2023 vóru 39 *endað* mál. Í 30 av hesum málum var illgruni um kynsligan ágang og í 8 málum um harðskap. Í einum máli var illgruni um bæði kynsligan og likamligan ágang. 30 mál við illgruna um kynsligan ágang er nógv tað hægsta í søguni hjá Barnahúsinum. Miðal-

talið er 15, har árliga talið fyri tað mesta hevur ligið á leið. 8 mál við illgruna um harðskap er í lægra endanum, har miðal er 12 um árið.

Kynsbýtið í málum í 2023 mestsum javnvigar við 20 dreingjum og 19 gentum. Tá tað ræður um aldursbýtið á børnum, hvørs mál vóru kannað í Barnahúsinum í 2023, vóru lutfalsliga mong børn eldri enn 10 ár.

Tey, sum vóru undir illgruna fyri at fremja harðskap ella annan ágang móti børnum vóru eisini í 2023 í mestan mun mannfólk: 29 menn og 8 kvinnur. Í einum føri var kynið ókent. Størsti einstaki aldursbólkurin av teimum, ið eru undir illgruna fyri kynsligan ágang ella harðskap móti børnum í 2023, hoyra til bólkin, eldri enn 50 ár.

Býtið millum mál við illgruna um harðskap og kynsligan ágang í miðal er ávikavist 12 mál við harðskapi og 15 við kynsligum ágangi um árið. Tað vil siga í miðal 44 % við harðskapi og 56 % við kynsligum ágangi. Samanbera vit við tøl hjá donskum barnahúsum eru býtið millum harðskap og kynsligan ágang ávikavist 74 % og 28 %. Ein rættiliga ítøkiligur munur, ið ilt er at meta um frágreiðingarnar til.

Í miðal eru 32 byrjað mál. Tað svarar til 2,4 pr. 1000 børn 0-17 ár. Samanborið við donsk tøl liggja tey í regiónunum millum 1,1 og 2,3. Tað vil siga, at føroyska miðaltalið liggur beint omanfyri tað størsta í donsku regiónunum.

Hesi høvuðsúrslit verða lýst í talvum frá s. 5.

# 4 Átrokandi dagføringar av tilboðnum hjá Barnahúsinum

Við tíggju árum á baki hava vit viðkomandi og neyvar royndir við føroyskum børnum, sum hava verið fyri ágangi. Og umvegis áhaldandi samstarv við barnahús í grannalondum fylgja vit væl við, hvørjar royndir tey gera sær, og hvussu økið verður ment hjá teimum.
Her greiða vit frá, hvat vit halda vera neyðugt, fyri at føroyska Barnahúsið kann veita føroyskum børnum, sum hava verið fyri ágangi, og familjum teirra eitt nútíðarhóskandi og dygdargott tilboð.

***1. Frá kreppuhjálp til fullfíggjaða traumaviðgerð til øll børn í Barnahúsinum***

Nýliga samtykta lógin um lokking fer at hava við sær meira virksemi hjá Barnahúsinum. Tí nú er revsivert at lokka og avnoyða børn bæði fysiskt og talgilt. Hetta hevur við sær, at tað verður einfaldari hjá ákæruvaldinum at at lyfta próvbyrðuna í slíkum málum. Tað merkir aftur, at væntast kunnu fleiri mál av hesum slagi í Barnahúsinum.
Higartil hevur sálarfrøðiliga viðgerðin í Barnahúsinum sum meginregla bert umfatað sálarfrøðiliga kreppuhjálp til barnið og foreldrini ella avvarðandi umsorganarpersón, um hesi ikki eru undir illgruna fyri at hava framt kynsligan ágang ella harðskap móti barninum. Tað vil siga, at tá kreppuhjálpin er liðug, metir sálarfrøðingurin hjá Barnahúsinum um, hvørt barnið hevur tørv á meira sálarfrøðiligari hjálp fyri at koma fyri seg. Tað hevur, sum vera

man, týdning at hendan hjálp verður veitt skjótt. Veruleikin er tó, at tað meir enn so vísir seg, at long bíðitíð er at sleppa til skikkaðan sálarfrøðing – alt eftir hvar í landinum barnið býr, og hvussu long bíðitíðin er har. Tað merkir, at endamálið um, at "mál um ágang fáa somu dygdargóðu viðgerð kring alt landið" ikki altíð verður rokkið.
Vit leggja tí áherðslu á, at tað hevur skund, at Barnahúsið hevur orku at veita øllum børnum í barnahúsmálum, sum hava tørv á tí, fullfíggjaða traumaviðgerð eftir kreppuhjálpina. Hetta hevði tryggjað einsháttaða viðgerð av øllum føroyskum børnum. Skal hetta bera til, er tørvur á einum sálarfrøðingi afturat í Barnahúsið.

### *2. Børn, sum hava framt ágang á børn, skulu hava viðgerð*

Tað kemur fyri í barnahúsmálum, at tað eru børn ella ung undir 18 ár, ið hava framt ágang á børn. Hesi børn hava tørv á viðgerð, og tað er alneyðugt, at tey fáa professionella hjálp. Bæði fyri at koma fyri seg, og fyri at fyribyrgja framtíðar ágang. Í Danmark er viðgerðin av hesum børnum flutt til barnahúsini at viðgera. Barnaverndarstovan mælir staðiliga til, at sami leistur verður fylgdur í Føroyum, og at virksemið hjá Barnahúsinum verður víðkað til hendan málbólk. Vit hava bygt upp servitan og royndir í Barnaverndarstovuni og Barnahúsinum, sum eru natúrligar fortreytir fyri hesum virksemi.

### *3. Børn, sum hava verið fyri sálarligum harðskapi, skulu hava viðgerð*

Átak 10 í heildarverkætlanini, Harðskapur í parlagi og nærsambondum 2023-2028, leggur upp til at kriminalisera sálarligan harðskap. Endamálið er at javnseta sálarligan harðskap við likamligan. Víðari sigur heildarverkætlanin, at hetta m.a. kann hava við sær, at persónar, ið eru fyri sálarligum harðskapi, skjótari søkja sær hjálp ella sjálvir taka stig til at koma burtur úr støðuni.
Har børn eru fyri sálarligum harðskapi, eru fylgjurnar eins skaðiligar og tær fyri likamligum ella kynsligum ágangi. Tey hava sostatt sama tørv á sálarfrøðiligari hjálp og viðgerð. Í Danmark eru hesi børn málbólkur hjá barnahúsum, og hetta meta vit eisini eigur at galda í Føroyum. Barnahúsið hevur rætta førleikan at veita hesa viðgerð.
Ger landsstýrið álvara av ætlanini, fer hetta at hava við sær økt virksemi í Barnahúsinum.

### *4. Foreldur, sum hava framt harðskap móti egnum børnum, skulu hava viðgerð*
Grannalond okkara hava eisini víðkað um tilboðið í barnahúsunum til at umfata *foreldur*, sum hava framt harðskap ímóti sínum børnum. Orsøkin er, at børnini sum oftast hava framhaldandi samband við síni foreldur, hóast tey hava verið fyri harðskapi frá foreldrunum. Tí er umráðandi, at øll familjan fær sálarfrøðiliga viðgerð í barnahúsi, við tað at hesi hava flest royndir og serkunnleika innan økið. Vit mæla sostatt til, at virksemið hjá Barnahúsinum eisini fevnir um hesi foreldur. Tað vil siga, at virksemið fer frá útilokandi at vera kreppuviðgerð til barnið og foreldur, sum ikki eru undir illgruna, til eisini at fevna um sálarfrøðiliga viðgerð til alla familjuna, herundir eisini tann, sum er undir illgruna fyri at fremja harðskap móti sínum barni.

**5. Politisk raðfesting neyðug**

Skal tað bera til at víðka virksemið hjá Barnahúsinum til tey júst nevndu:

- Frá kreppuhjálp til fullfíggjaða traumaviðgerð til øll børn í Barnahúsinum
- Børn, sum hava framt ágang á børn, skulu hava viðgerð
- Børn, sum hava verið fyri sálarligum harðskapi, skulu hava viðgerð
- Foreldur, sum hava framt harðskap móti egnum børnum, skulu hava viðgerð

er neyðugt við politiskari raðfesting. Og er politiska skipanin sinnað at fremja hesar dagføringar, er neyðugt at seta ein sálarfrøðing afturat í Barnahúsið. Við hesum hevði borið til at veitt hesum børnum og teirra familjum sálarfrøðiliga viðgerð, tá tørvur er á tí.

## 5 Tal av byrjaðum og endaðum málum




*Samanborið við undanfarin ár leypur 2023 í eyguni við 53 barnahúsmálum, sum er størsta talið í søgu okkara. Úr 20 í fjør upp í 53 í ár. Miðaltalið er 32. Út frá tølunum á málum ber ikki til at greiða frá, hví tølini eru sum tey eru. Orsakirnar kunnu vera fleiri. Ein orsøk kann vera, at tað í 2023 vóru fleiri mál, har illtonktu gingu aftur í fleiri málum. Orsøkin til at munurin í ár er so stórur millum byrjað og endað mál er, at fleiri nýggj mál komu við ársenda 2023. Tískil vóru fleiri opin mál um ársskiftið.*

# 6 Slag av ágangi í málum, sum eru endað




*Talið av málum grundað á harðskap í 2023 eru fleiri enn í 2022, sum var óvanliga lítið, men nakað nærri tølunum undanfarin ár. Miðaltalið er 12. At tað er heldur minni enn miðal kann vera orsakað av, at tann ráðgeving, ið barnaverndartænastur síðan 1. mars 2022 hava fingið frá løgregluni, hevur havt við sær, at summi mál, sum fyrr vórðu barnahúsmál, nú í staðin verða viðgjørd sum vanlig barnaverndarmál.*
*Í 2023 vóru 30 mál, sum vóru grundað á kynsligan ágang, sum er nógv tað størsta talið í søguni hjá Barnahúsinum. Og dupult so nógv sum miðal, sum liggur á 15. Ein orsøk* ***kann*** *vera, at tað í 2023 vóru fleiri mál, har illtonktu gingu aftur í fleiri málum, eins og víst hevur verið á áður.*

## 6.1 Hvat fevnir harðskapur og kynsligur ágangur um?

Í Barnahúsinum verða eyðkennini fyri tey ymisku sløgini av harðskapi og kynsligum ágangi skrásett. Í summum førum kann eitt barn bæði hava verið fyri harðskapi *og* kynsligum ágangi.

Viðvíkjandi harðskapi, kann barnið hava verið fyri ógvusligari viðferð, so sum lúsingi, bresti, sløgum ella sparki. Tað kann eisini hava verið sligið við onkrum luti. Onkur kann hava tikið kvørkratak um tað ella givið tí brunamerki ella brunasár. Ella rykt í tað. Eisini kann talan vera um hóttanir við vápni ella hóttan um harðskap. At enda kann eitt barn hava verið vitni til harðskap. Tey sløgini av harðskapi, sum eru skrásett fyri 2023 fevna í 5 førum um lúsing, brest, sløg ella spark; í einum føri varð eitt barn sligið við luti; í einum var rykt í barnið. Og í tveimum málum hevði barnið sæð harðskap.

Eisini kynsligur ágangur fevnir um ymiskar gerðir, sum fevna líka frá neyðtøku til blygdanarskemd og skemman við KT. Her kann talan vera um neyðtøku[1] av børnum yngri enn 15 ár, annað kynsligt samband enn neyðtøku (gjøgnum munn, baktarmsop, ymiskt

[1] Í revsilógini verður neyðtøka nevnd "samlega", hóast talan er um barn. Í Barnahúsinum nevna vit hetta neyðtøku.



Barnaverndarstova Føroya

stappað í skeið og baktarmsop). Eisini kann talan vera um keyp av kynsligum tænastum, blygdanarskemd (nektan, kávan, lúran, skendsk/ur í orð og tal) ella at nerta við kynsgøgn hjá illtonkta. Eisini eru málini við skemman í sambandi við KT (umvegis internetið ella fartelefon) og mynda- ella filmsupptøka av barni/ungum, ið er yngri enn 18 ár serliga seinnu árini vorðin partur av barnahúsmálum. Í 2023 vóru 13 mál við júst skemman í sambandi við KT og 11 mál við mynda- ella filmsupptøku. Harumframt vóru 3 mál við neyðtøku av barni yngri enn 15 ár, 2 við øðrum kynsligum sambandi enn neyðtøku, 5 við blygdanarskemd og 3 við at nerta við kynsgøgn hjá illtonkta.

# 7 Samanbering við donsk tøl

## 7.1 Býtið harðskapur og kynsligur ágangur

Sum sæst í talvuni á s. 6, er býtið millum mál við illgruna um harðskap og kynsligan ágang í miðal ávikavist 12 mál við harðskapi og 15 við kynsligum ágangi. Tað vil siga í miðal 44 % harðskapur og 56 % kynsligan ágangur.

Samanbera vit við tøl hjá donskum barnahúsum til samans, vóru býtini soleiðis fyri 2022, 2021 og 2020 (tøl fyri 2023 eru ikki tøk enn):

| | **Harðskapur** | **Kynsligur ágangur** | **Sálarligur harðskapur**[2] |
|---|---|---|---|
| **2022** | 74 % | 28 % | 24 % |
| **2021** | 74 % | 29 % | 19 % |
| **2020** | 75% | 28 % | 18 % |

(Kelda: Årsstatistik om de danske børnehuse 2020, 2021 og 2022)

Trý undanfarnu árini hevur býtið verið umleið 74 % harðskapur og umleið 28 % kynsligur ágangur. Hetta bendir týðiliga á, at býtið millum harðskap og kynsligan ágang í barnahúsmálum í Føroyum og Danmark er rættiliga ymiskt. At harðskapur eru umleið ¾ og kynsligur ágangur ¼ í Danmark samanborið við ávikavist 44 % og 56 % í Føroyum. Hví so er, er ilt at meta um.

Skoytast kann uppí, at í donsku barnahúsmálunum í 2022, har illgruni ella vitan var um sálarligan harðskap, var tað ofta í kombinatión við fysiskan harðskap. Bert í 2 % av málunum var einans illgruni ella vitan um, at barnið var fyri sálarligum harðskapi. Í 19 % av málunum var illgruni ella vitan um, at barnið var fyri bæði fysiskum og sálarligum harðskapi. Í 50 % av málunum var einans illgruni ella vitan um fysiskan harðskap, og í 22 % av málunum var einans illgruni ella vitan um kynsligan ágang. (Årsstatistik om de danske børnehuse 2022, s 10)

[2] Frá 1. apríl 2019 er sálarligur harðskapur vorðið revsivert í donsku revsilógini § 243. Harvið bar til hjá barnahúsum at skráseta, um illgruni ella vitan er um sálarligan harðskap framdur á barnið. Føroyska revsilógin hevur ikki hesa áseting.

### 7.2 Barnahúsmál pr. 1000 børn 0-17 ár

Í Føroyum vóru við ársenda 2023 13.198 børn í aldrinum 0-17 ár. Miðaltalið á byrjaðum barnahúsmálum er 32. Hetta gevur 2,4 byrjað mál um árið í miðal pr. 1000 børn.

**Donsk tøl býtt millum øki í 2022:**

| Øki | Byrjað barnahúsmál | Byrjað barnahúsmál pr. 1000 børn 0-17 ár |
|---|---|---|
| Region Hovedstaden | 400 | 1,1 |
| Region Sjælland | 269 | 1,7 |
| Region Syddanmark | 550 | 2,3 |
| Region Midtjylland | 507 | 1,9 |
| Region Nordjylland | 208 | 1,9 |

(Kelda: Årsstatistik om de danske børnehuse 2022)

| | | |
|---|---|---|
| Føroyar | 32 | 2,4 |

Á tølunum sæst, at talið á byrjaðum málum pr. 1000 børn 0-17 ár er eitt vet omanfyri størsta talið í Danmark, sum er fyri region Syddanmark. Viðmerkjast skal, at tølini sveiggja nógv millum donsku býirnar (millum 0 og 8,7). Tó at lógarverk, barnahúsleistur og mentan kunnu sigast at vera lík í londunum báðum, er torført at meta um tølini. Sosialt eftirlit verður ofta tikið fram sum frágreiðing upp á føroysk viðurskifti. Eisini varð rætturin til likamliga revsing av børnum gjørdur revsiverdur fyrr í Danmark (1997) enn í Føroyum (2006). Ein annar munur er, at kunnandi átøk um harðskap og kynsligan ágang hava leingi verið Danmark; hetta hevur ikki verið gjørt í sama mun í Føroyum. Hetta hevur Almannamálaráðið tó í heildarverkætlanini[3] sett sum átak í 2024. Men ivaleyst eru fleiri frágreiðingar.

# 8 Kyns- og aldursbýti í endaðum málum

## Kyn:




*Í 2023 var kynsbýtið javnt millum børn, hvørs mál vóru viðgjørd í Barnahúsinum. Seinastu árini hevur talið aloftast verið ein yvirvág av gentum.*

[3] Heildarverkætlan: Harðskapur í parlagi og nærsambondum 2023-2028

## Aldur á barni (tá málið varð endað í Barnahúsinum):




*Í talvuni sæst, at spjaðingin í aldri á teimum børnum, hvørs mál vóru kannað í Barnahúsinum í 2023, fevndi um lutfalsliga mong børn eldri enn 10 ár.*

# 9 Fólk, ið eru undir *illgruna* í sambandi við barnahúsmál

## Kyn:




*Talvan vísir, at tað eisini í 2023 í mestan mun vóru mannfólk, sum vóru undir illgruna fyri at fremja kynsligan ágang ella harðskap móti børnum. Í onkrum av málunum eru fleiri illtonkt. Kvinnurnar, sum eru undir illgruna, eru allar undir illgruna fyri at hava framt harðskap.*

## Aldur:




*Størsti einstaki aldursbólkurin av teimum, ið eru undir illgruna fyri kynsligan ágang ella harðskap móti børnum í 2023, hoyra til bólkin, eldri enn 50 ár.*

## Persónligt samband við barnið ella unglingan:




*Bólkurin "Onnur" fevnir eitt nú um onnur ung, grannar og fólk, sum kenna familjuna, fremmandafólk, eins og starvsfólk, ið á ymsan hátt hava við børn at gera.*

# 10 Støðið undir virksemi okkara

Barnahúsið hevur verið virkið síðan 1. januar 2014. Vit halda til í leigaðum hølum í Tórshavn, sum eru serliga innrættað til sítt endamál. Í juli 2023 flutti Barnahúsið í onnur høli, eftir at fyrrverandi høli skuldu takast niður. Núverandi hølini hava á leið somu hentleikar og stand sum tey fyrru.

Arbeitt verður við málum, ið snúgva seg um kynsligan ágang ella harðskap móti børnum og ungum. Ágangurin kann vera framdur fyrr í lívinum hjá barninum, ella kann talan vera um nýliga íkomin mál. Yvirskipað er uppgávan at veita barni og familju trygd fyri væl grundaða

fakliga viðgerð. Hetta verður gjørt við at samskipa samstarv millum almennu myndugleikarnar, barnavernd, heilsumyndugleikar og løgreglu.

Barnahúsið er innrættað við serligum denti á, at tey, sum kanna málini, kunnu hittast á jøvnum føti við børnini og tey ungu.

Børn, ung og familjur koma í Barnahúsið eftir áheitan frá barnaverndartænastunum. Familjur kunnu ikki sjálvar venda sær til Barnahúsið.

Í Barnahúsinum:
- fáa børn ella ungfólk og avvarðandi teirra sálarfrøðiliga kreppuhjálp og kreppuviðgerð
- verður mett um tørvin á læknakanning
- avhoyrir løgreglan børn til og við 14 ára aldur við videoútgerð og avhoyrir ung, sum eru 15 til og við 17 ára gomul
- verður mett um framtíðar tørvin hjá barninum ella ungfólkinum á serligum stuðli og serligari viðgerð
- fáa málsviðgerar í barnaverndartænastunum ráð og hjálp til at greiða og greina tørvin á stuðli. Hetta verður alt gjørt sum liður í barnafakligu kanningini sambært § 45 í barnaverndarlógini.

**Illgruni um ágang móti børnum og ungum**

Mál, ið arbeitt verður við, byrja ofta við einum ***illgruna***, og tí snúgva upplýsingarnar um virksemi okkara seg um ágang, sum illgruni ella ein ávís vitan er um. Løgreglan kannar málið og skuldsetir møguliga illtonkta. Ákæruvaldið metir síðani um, hvørt ákæra eigur at verða reist í málinum. Tað kann taka sína tíð, áðrenn dómur møguliga fellur í rættinum. Tí leggja vit dent á, at hagtølini í hesi frágreiðing snúgva seg um fólk, ið eru undir illgruna.

Í málum av hesum slagi er tað nú einaferð soleiðis, at próvbyrðan skal lyftast á fullgóðan hátt, hóast umstøðurnar stundum bæði kunnu vera torgreiddar og kámaðar burtur í einum truplum tíðarskeiði hjá barninum. Tískil kann stundum vera ilt at meta um, hvat í roynd og veru kann vera farið fram við barninum.

**Sálarfrøðiviðgerð til harðskapsrakt børn og lóg um lokking**

Tveir týðandi batar vórðu framdir í 2023:

Átak 9 í heildarverkætlanini, Harðskapur í parlagi og nærsambondum 2023-2028, leggur upp til at veita sálarfrøðiligt viðgerðartilboð til harðskapsrakt børn, íroknað børn, sum flyta á Kreppumiðstøðina saman við mammuni. Hetta átak varð samtykt við virknaði frá 1. januar 2024. Barnahúsið hevur fingið hesa nýggju uppgávu, og vit leggja drúgva orku í at snikka eitt haldgott sálarfrøðiligt viðgerðartilboð til harðskapsraktu børnini, sum eru fevnd av tí. Vit

fegnast mikið um hendan týðandi bata, sum vit eru sannførd um fer at hjálpa børnunum í støðuni við harðskapi og at fyribyrgja langtíðarárin av harðskapinum.

Í øðrum lagi samtykti løgtingið í desember 2023 einmælt at broyta revsilógina um kynsliga avnoyðslu og lokking. Hetta hevur við sær, at lokking og kynslig avnoyðsla eru vorðin kynslig brotsverk í Føroyum, eins og tey eru í nógvum øðrum londum. Áðrenn lógarbroytingina var torført hjá ákæruvaldinum at lyfta próvbyrðuna í sambandi við lokking og avnoyðslu.

Sjálvandi ber ikki til at lóggeva seg burtur úr, at kynsligur ágangur so sum lokking kemur fyri. Men lógarbroytingin er eitt týðandi fet rætta vegin til betri verju av børnum og ungum fyri kynsligum ágangi.

**Hvat eru lokking og kynslig avnoyðsla?**

Lokking verður eisini nevnt "grooming". Lokking lýsir eina tilgongd, har ein persónur (skemmari) byggir upp eitt álitsfult samband við eitt barn/ungan fyri fáa barnið at gerast partur í virksemi, ið skal nøkta skemmaran. Lokking verður brúkt um kynsligan skemmara, sum manipulerar barn. Lokking fer bæði fram fysiskt og talgilt – ella sum bæði tvey saman. Til dømis har tað byrjar talgilt, og barn og skemmari síðani møtast seinni.

Kynslig avnoyðsla verður á enskum nevnt "sextortion", samansett av "sex" og "extortion." Kynslig avnoyðsla er, tá ein persónur (avnoyðari) brúkar kynsligar ella intimar myndir ella film av ofrinum at avnoyða ofrið. Ofrið skal til dømis gjalda pening ella senda fleiri intimar myndir til avnoyðaran fyri at sleppa undan, at hesin almannakunnger myndirnar til eitt nú familjuna hjá ofrinum ella facebookvinir. Tað hevur stórar avleiðingar fyri eitt barn at vera fyri kynsligari avnoyðslu.